# un á mati og ruski



*Bergur Olsen, fuglafrøðingur, sigur, at skrásetingin av ruskinum í magunum á havhesti verður gjørd í Texel í Hálandi, meðan restirnar av rættari føði, sum er í magunum, verða sendar aftur til Føroya, har tær verða kannaðar nærri. Hesar kanningar ganga fyri seg á Náttúrugripasavninum*

Mynd: Jens Kr. Vang



*Um menniskju gingu við líka nógvum ruski í maganum, sum havhesturin undir Føroyum ger, hevði lutfallið verið tað, sum vit síggja á hesi myndini. Tá ið havhestur etur plastik og annað rusk, sum ikki sodnar, verður tað liggjandi leingi í maganum*

Mynd: Jens Kr. Vang

aftur til Føroya, har tær verða kannaðar nærri.

- Hetta gongur fyri seg á Náttúrugripasavninum, har Solveig Sørensen eitt nú greinar og mátar nytrur, høgguslokkanev, kjaftar av bustmaðkum og aðrar restir av føði, sum verða funnar í magunum.

Bergur sigur, at Jóhannis Danielsen, sum skrivar Phd um havhest, er eisini knýttur at kanningini.

**Føðin broytist**

Meginparturin av magunum eru tiknir úr havhesti, sum er fleygaður til matna, bæði á landi og umborð á skipi.

- Tað tykist, at bæði nøgdin av ruski og samansetingin av føði broytist gjøgnum árið, og tí verður nú farið undir at kanna hetta nærri yvir alt árið.

Bergur Olsen, fuglafrøðingur, sigur, at einir 600 havhestamagar skulu kannast í hesum sambandi og til at fíggja hetta arbeiði, er søkt um stuðul frá eitt nú oljufeløgunum.

# bbar ótu f og bowlaðu

teimum, sum bíðaðu og hugdu at.

Tilkomnar konur og tilkomnir menn kastaðu hesa løtuna kúlur í heilar tveir tímar, og onkur helt fyri, at nú fór ikki at ganga long tíð, til armurin loysnaði úr akslunum.

Men áhugin var størri enn so og eingin, sum var í høllini, keddi seg í ein einasta minutt!

Heldur var tað so, at flestu høvdu ynskt sær eina løtu aftrat, tá ið tíðin umsíðir rann út.

Jú, Bowling-høllin í Leirvík er avgjørt komin fyri at vera, og sum skilst, er hon rættiliga nógv upptikin og eftirspurd, nú tað stundar til jóla, og fólk hava hug at fara út at hugna sær saman.



*Tær sita spentar og hyggja at, meðan onkur í bólkinum roynir seg*

Mynd: Súsanna Joensen

# Leikaløtan á Dramaverkstaðnum



**JÓLALEIKUR**

*tíðindaskriv*

Á Dramaverkstaðnum verður jólasýningin ”Leikaløtan” sum vant fyri børnum og avvarðandi. Sum undanfarnu árini, er hetta sýning fyri børnum saman við vaksnum, og dentur er lagdur á, at tey heilt heilt smáu børnini eisnini fáa nakað burturúr.

Dramaverkstaðið liggur í brekkuni niðan á Nabb beint undir tí grønu ítróttarhøllini í Havn.

Hesa seinastu tíðina hava tey ungu og børnini á drama- og teaturskúlanum á Dramaverkstaðnum vant og knossast dúgliga fyri at verða klár sunnudagin tann 4. desember klokkan 18, tá sýningarnar byrja.

Í ár eru tað fýra bólkar sum leika saman, og tey eru 8 til 15 ára gomul.

Á skránni er leikurin ”Krubbuspæl” og ein ”Søga” sum verður søgd og spæld. Millum hesar leikirnar verður ”Gykl og skemt” sum Rógvi Dam og Birna Heinesen framføra.

Tey vitjandi kunnu verða málaði um andlitið og, um tey hava hug, sleppa at spæla við í søguni! Søgan er um nissur, dólgar og fleiri onnur…. so tað er bara at koma til Leikaløtuna og hava tað stuttligt eina løtu!

# Nýggj bók um vanlukkur á sjónum

**Forlagið Gráfelli hevur givið út ta seinnu bókina „Við úthavsins strendur - um vanlukkur í Norðurhøvum“, sum fyrrverandi útvarpsmaðurin Árni Joensen hevur skrivað**

**ÚTGÁVA**

*tíðindaskriv*





*Seinna bókin um vanlukkur á sjónum eftir Árna Joensen er nú komin á marknaðin*

Í hesari bókini verður sagt frá vanlukkum á sjónum síðani 1975 til dagin í dag. Serligur dentur er lagdur á vanlukkur við føroyskum skipum og útlendskum skipum, sum føroyingar vóru við. Eitt nú verður greitt frá, tá snelluskipið „Guliklettur“ fórst í Íslandi, tá farmaskipið „Star River“ sakk norður úr Kallinum, og tá oljuflutningsskipið „Stathav“ sakk við Hoyvíkshólm. Trolbáturin „Sjóborgin“ hevur sína serligu søgu. Hann sakk fyrst í Scrabster og gekk seinni burtur norður úr Mýlingi.

Í bókini verður eisini sagt frá tilburðinum, tá línuskipið „Sigurfari“ bjargaði monnum av einum russiskum farmaskipi í ódnarveðri á Flemish Cap, og tá „Tróndur í Gøtu“ tók deyðar menn upp av tí í Føroyum so kenda, týska garnaskipinum „Hansa“, sum sakk vestur úr Skotlandi. Eisini er frásøgn frá tilburðinum, tá norska línuskipið „Bordanes“, sum tríggir føroyingar vóru við, sakk undir seting á Nordkappbankanum.

Tann seinasti kapittulin í bókini er um vanlukkuna, tá „Jøkulfell“ sakk í landnyrðing úr Føroyum fyrst í hesum árinum.

Fleiri áhugaverdar frásagnir eru eisini frá vanlukkum við øðrum útlendskum skipum. Eitt nú er frásøgn frá tilburðinum, tá ein bretskur kavbátur togaði ein skotskan trolara niður. Hesin kavbáturin hevði júst verið á venjingarferð ímillum Skotland og Føroyar.

„Við úthavsins strendur“ - seinna bók - er prýdd við nógvum myndum, og bókin kostar 248 krónur í bókabúðunum.

Nú jólini nærkast, ber til at keypa ta fyrru og ta seinnu bókina pakkaðar við vøkrum jólabandi í bókabúðunum fyri 398 krónur.